VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

# Býráðið

**Dagfesting:** 25.11.2019 kl. 18:00
**Fundarstaður:** Býráðsskrivstovan
**Málnr.:** 19/00436

Til staðar: Eyðdis Hartmann Niclasen, Dagbjørn Hansen, Albert Ellefsen, Heðin Poulsen, Jonhard Joensen, Jórun S. Haraldsen, Dánial Johansen, Jóhannis Joensen

Varalimir: Tórdis Dam Johannesen (f. Rósu Samuelsen)

Ikki til staðar: Jens Gaardlykke, Dánjal Thomsen

Aðrir partar: Albert Thomassen, fíggjarleiðari

Fundarskrivari: Jóannes N. Dalsgaard


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | | |
| 103/19 | 19/00767-3 | Støðutakan til eykaætlan EXTRA19_05 | 4 |
| 104/19 | 19/00426-26 | Støðutakan til fíggjarætlan fyri 2020 - 2. viðgerð | 5 |
| 105/19 | 19/00613-5 | Tilboð uppá trygdararbeiðið | 8 |
| 106/19 | 19/00590-5 | Støðutakan til umsókn frá Petur Jacob Sigvardsen um stuðul til sjálvsævisøgu | 9 |
| 107/19 | 19/00486-4 | Støðutakan til umsókn frá Jan Erik Simonsen um stuðul til at geva út bók um hekkutrolaran Vesturvón, bygdur í 1969 | 10 |
| 108/19 | 19/00764-3 | Støðutakan til umsókn um kr. 50.000 í stuðli til útgávu av bók um Bente Chirstine Broberg | 11 |
| 109/19 | 19/00802-2 | Støðutakan til skriv frá stigtakarum til nýggjárshald | 12 |


Formansváttan:____________

| | | | |
|---|---|---|---|
| 110/19 | 19/00535-3 | Støðutakan til áheitan frá Krabbameinsfelagnum um samstarv til heilsufremjandi átak fyri krabbameins-sjúklingar í Vágum | 13 |
| 111/19 | 19/00046-2 | Eigarin av matr. nr. 397a í Vatnsoyrum søkir um at áður givnar treytir fyri breidd á Marknaveg í sambandi við sundurbýti og útstykking verða broyttar | 14 |
| 112/19 | 19/00138-3 | Støðutakan til, um kommunan skal ogna sær lendið á Kumlum, har kommunan hevur lagt kloakk og gjørt gøtu | 15 |
| 113/19 | 19/00316-4 | Støðutakan til, um kommunan skal royna at finna eykaskrúvuna á Nýggjaberg og, um hon verður funnin, taka hana upp, so hon kann varðveitast sum krígsminni. | 16 |
| 114/19 | 19/00518-3 | Støðutakan til umsókn um loyvi at leiga "Gamla Telefonhúsið" á matr. nr. 388 í Miðvági | 17 |
| 115/19 | 19/00608-2 | Støðutakan til umksókn frá Miðvágs Róðrarfelag um loyvi at gera nýggja bátabrúgv við Róðrarneystið í Miðvági | 18 |
| 116/19 | 19/00637-5 | Umsókn um byggiloyvi til nýggja staðseting av standmyndini "Seyðamaðurin á Sondum" | 19 |
| 117/19 | 19/00669-2 | Umsókn viðvíkjandi virkisbygningi á Hillingartanga, keyp av økið millum matr. 232b og Timburhandilin (partur av vegi ba) | 20 |
| 118/19 | 19/00676-2 | Umsókn um at umbyggja vestara part av pakkhúsinum Úti á Bakka 1 til íbúð. | 21 |
| 119/19 | 19/00689-2 | Støðutakan til ummæli av umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 375a og 375b í Sandavági | 22 |
| 120/19 | 19/00730-3 | Støðutakan til uppskot frá HMP um støðd á grundstykkjum í Vatnsoyrum. | 23 |
| 121/19 | 19/00793-2 | Umsókn frá Jóahnnus og Vilhelm Hansen, um altan á matr. nr. 221e í Sandavági | 24 |
| 122/19 | 19/00673-1 | Støðutakan til uppskot frá borgarstjóranum til 'Reglugerð fyri viðgerð og avgreiðslu av umsóknum til kommununa um fíggjarligan stuðul frá feløgum og einstaklingum til mentan og ítrótt' | 25 |


Formansváttan:____________

| | | | |
|---|---|---|---|
| 123/19 | 19/00681-1 | Støðutakan til uppskot frá borgarstjóranum til 'Reglugerð<br>fyri umsiting av tekniska økinum hjá Vága kommunu' | 28 |
| 124/19 | 19/00826-2 | Støðutakan til umsókn frá Felagnum Vágar um eykajáttan | 30 |
| 125/19 | 19/00830-2 | Støðutakan til umsókn, frá Felagið Vágar, um stuðul fyri árið 2020 | 31 |
| | | | |

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**Til støðutakan**

## 103/19 Støðutakan til eykaætlan EXTRA19 05

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.11.2019 | 75/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 103/19 |

**Málslýsing:**

**Rakstrarjáttan:**

| | | |
|---|---|---|
| § 1 | Kommunal fyrisiting lækkar við | kr. 152.000,- |
| § 3 | Børn og ung hækkar við | kr. 290.000,- |
| § 6 | Teknisk mál hækkar við | kr. 69.845,- |
| § 7 | Kommunal virki lækkar við | kr. 150.000,- |

**Rakstrarjáttanin hækkar við tils. kr. 57.845,-**

**Løgujáttan:**

| | | |
|---|---|---|
| § 4 | Undirvísing nýggj avseting | kr. 100.000,- |
| § 5 | Mentan og frítíð lækkar | kr.3.000.000,- |
| § 6 | Teknisk mál hækkar | kr. 270.000,- |

**Løgujáttanin lækkar við tils. kr.2.630.000,-**

**Fíggjarnevndin 21. november 2019:**
**Avgerð:**
Viðmælt.

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 104/19 Støðutakan til fíggjarætlan fyri 2020 - 2. viðgerð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.11.2019 | 84/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 104/19 |

**Málslýsing:**
Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja fram uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember 2019.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt uppskot til fíggjarætlan fyri 2020.
Broytingar eru framdar millum 1. og 2. viðgerð.

| | |
|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 89.482.478 |
| Løguútreiðslur | 15.800.000 |
| Inntøkur | 104.476.000 |
| RLÚ | -806.478 |

**Fíggjarnevndin 21. november 2019:**
**Avgerð:**
Mælt verður til at gera hesar broytingar til fyriliggjandi uppskot:
RS 61000 konto 1651, Gamli skúlin í Sandavági, hækka avseting við kr. 500.000,-
RS 31010 konto 1651, Miðgarður, avseta kr. 400.000,-
RS 410 konto 1651, Skúlin á Giljanesi, hækka avseting við kr. 100.000,-
RS 41004 konto 3131, Skúlabygging á Giljanesi, hækka avseting við kr. 9.000.000,-
RS 221 konto 7140, Heimatænastan, hækka avseting við kr. 1.200.000,-

---

Dagbjørn Hansen, Jonhard Joensen og Jórun S. Haraldsen hava lagt fram soljóðandi broytingaruppskot til 2. viðgerð á býráðsfundi 25.11.2019:

1) Skotið verður upp, at teksturin til undirkonto *6.11.32.370. Fríðkan av kommununi (Rakstrarjáttan)* verður soljóðandi:

   "Játtanin er til røkt av grønum økjum, reinhald og gøtusóping.
   Játtanin er hækkað við 147 tkr. í mun til 2019.
   Í 2020 verður raðfest at brúka av játtanini til at rudda grótbrotið norðanfyri Sarpar í Sandavági."

2) Skotið verður upp, at teksturin til undirkonto *6.11.32.371 Fríðkan av kommununi (løgujáttan)* verður soljóðandi:

   "Játtanin er til ger av miðstaðarøkjum í bygdunum í kommununi.
   Játtanin er hækkað við 200 tkr. í mun til 2019.

Formansváttan:____________

Í 2020 verður raðfest at brúka av játtanini til at seta ljós upp í viðarlundini í Miðvági."

3) <u>Skotið verður upp, at teksturin til undirkonto *6.22.11.370. Byggibúning bústaðir (Løgujáttan)* verður soljóðandi:</u>

"Játtanin fer til byggibúning, herundir liðugtgerð av verandi útstykkingum.
Játtanin er hækkað við 4.200 tkr. í mun til 2019.
Í 2020 verður raðfest at brúka av játtanini til:
- at breiðka Traðaveg í Sandavági,
- at leggja eitt lag av asfalti á vegirnar við Stóraklett í Sandavági og Olivarsveg í Miðvági, tó ikki á gongubreytirnar í hesum umfari,
- at gera Nýggjaveg í Miðvági lidnan frá matr. nr. 208h og norður til Svabosveg, íroknað teymin niðan til matr. nr. 208g,
- at gera Kálvalíðvegin í Miðvági lidnan út til markið millum matr. 259e og 259a.

500 tkr. eru avsettar til vetrarfriðing av býlinginum í Sørpum í Sandavági."

4) <u>Skotið verður upp, at teksturin til undirkonto *6.28.12.371. Gøtuljós (Løgujáttan)* verður soljóðandi:</u>

"Játtanin er til uppsetan av nýggjum gøtuljósum og til umskifti til LED-ljós á verandi mastrum.
Játtanin er lækkað við 300 tkr. í mun til 2019.
Í 2020 verður raðfest at brúka av játtanini til at seta upp gøtuljós úr Sørpum í Sandavági og norð til íbindingina í landsvegin, norðanfyri vakstrarhúsið."

5) <u>Skotið verður upp, at teksturin til undirkonto *6.30.41.371 Kloakkir (løgujáttan)* verður soljóðandi:</u>

"Játtanin er til dagføring av spillvatnleiðingunum samsvarandi krøvum frá Umhvørvisstovuni.
Játtanin er óbroytt í mun til 2019.
Í 2020 verður raðfest at brúka av játtanini til at føra leiðingar, sum renna í Stóra út á sjógv, og at føra leiðingar í Giljum út á sjógv."

**<u>Býráðið 25. november 2019:</u>**
**Avgerð:**
Samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini.

Samtykt at taka undir við broytingaruppskotinum, við hesum broytingum:

1) at teksturin til undirkonto *6.22.11.370. Byggibúning bústaðir (Løgujáttan)* verður soljóðandi:

"Játtanin fer til byggibúning, herundir liðugtgerð av verandi útstykkingum.

Formansváttan:____________

Játtanin er hækkað við 4.200 tkr. í mun til 2019.
Í 2020 verður raðfest at brúka av játtanini til:

- at breiðka Traðaveg í Sandavági,
- at leggja eitt lag av asfalti á vegirnar við Stóraklett í Sandavági og Olivarsveg í Miðvági, tó ikki á gongubreytirnar í hesum umfari,
- at gera Nýggjaveg í Miðvági lidnan frá matr. nr. 208h og norður til Svabosveg, íroknað teymin niðan til matr. nr. 208g,
- at umvæla og dagføra brúnna um Lambá á Nýggjavegi,
- at gera Kálvalíðvegin í Miðvági lidnan út til markið millum matr. 259e og 259a.

500r. eru avsettar til vetrarfriðing av býlinginum í Sørpum í Sandavági."

2) at teksturin til undirkonto *6.11.32.371 Fríðkan av kommununi (løgujáttan)* verður soljóðandi:

"Játtanin er til ger av miðstaðarøkjum í bygdunum í kommununi.
Játtanin er hækkað við 200 tkr. í mun til 2019.
Í 2020 verður raðfest at brúka av játtanini til:

- miðstaðarøki í Vatnsoyrum,
- at seta ljós upp í viðarlundini í Miðvági."

Formansváttan:____________

# 105/19 Tilboð uppá trygdararbeiðið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.11.2019 | 74/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 105/19 |

**Málslýsing:**
Endamálið við trygdararbeiðinum er at tryggja at kommunan og allir stovnar undir kommununi lúka krøvini í galdandi lóggávu um viðgerð av persónsupplýsingum og viðkvomum upplýsingum umframt at finna fram til møgulig frávik í mun til nýggju og herdu krøvunum, sum eru ávegis í nýggjari persónsupplýsingarlóg.

Tilboðið er í 4 pørtum:
1. Trygdarskoðan (innlit og yvirlit)
2. Rapport og tilmælir og raðfesting (framløga)
3. Dagføring av verkseting av manglum
4. Dagføring av KT-trygdarpolitikki og váðagreining.

Kostnaðurin fyri ymisku partarnar er:
1. kr. 72.000 (tekur 90 tímar yvir 3 mánaðir)
2. kr. 48.000 (tekur 60 tímar yvir 2 mánaðir)
3. kr. 24.000 (tekur 30 tímar yvir eina mánaða)
4. kr. 12.000 (tekur 15 tímar)

Kostnaður íalt kr. 156.000,-

Ætlanin er at byrjað uppá 1. part í hesum árinum.

**Fíggjarnevndin 21. november 2019:**
**Avgerð:**
Viðmælt – Peningur verður avsettur til uppgávuna á fíggjarætlanini fyri 2020

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 106/19 Støðutakan til umsókn frá Petur Jacob Sigvardsen um stuðul til sjálvsævisøgu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 14.11.2019 | 56/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.11.2019 | 78/19 |
| 3 Býráðið | 25.11.2019 | 106/19 |

**Málslýsing:**

Petur Jacob Sigvardsen søkir í skrivi, dagfest 26.09.2019, Vága kommunu um stuðul til útgávu av sjálvsævisøgu.

Talan er um tvey bind uppá tilsamans umleið 700 síður. Í verkinum vera umleið 300 myndir. Útgávan er mett at kosta umleið kr. 150.000 og søkt verður um 'munagóðan stuðul' til fíggingina.

Umsøkjarin nevnir um umsókn síni, at stórur partur av tilfarinum í bókini er um tíðina, hann starvaðist sum lærari í núverandi Vága kommunu.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 14. november 2019:**
**Avgerð:**

Viðmælt at stuðla við Kr. 25.000,-, peningurin verður settur av á fíggjarætlanini í 2020.

**Fíggjarnevndin 21. november 2019:**
**Avgerð:**
Viðmælt

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at veita kr. 25.000 í stuðli. Stuðulin verður útgoldin í 2020.

Formansváttan:____________

## 107/19 Støðutakan til umsókn frá Jan Erik Simonsen um stuðul til at geva út bók um hekkutrolaran Vesturvón, bygdur í 1969

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 14.11.2019 | 54/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.11.2019 | 76/19 |
| 3 Býráðið | 25.11.2019 | 107/19 |

**Málslýsing:**

Jan Erik Simonsen søkir um stuðul til at geva út bók um sørvágstrolaran Vesturvón, sum var latin eigarunum í 1969.

Viðlagda fíggjarætlanin vísir ein mettan fíggingartørv á umleið kr. 285.000.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 14. november 2019:**
**Avgerð:**

Viðmælt at stuðla við Kr. 25.000,-, peningurin verður settur av á fíggjarætlanini í 2020.

**Fíggjarnevndin 21. november 2019:**
**Avgerð:**
Viðmælt

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at veita kr. 25.000 í stuðli. Stuðulin verður útgoldin í 2020.

Formansváttan:____________

## 108/19 Støðutakan til umsókn um kr. 50.000 í stuðli til útgávu av bók um Bente Chirstine Broberg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 14.11.2019 | 60/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.11.2019 | 79/19 |
| 3 Býráðið | 25.11.2019 | 108/19 |

**Málslýsing:**

Lydia og Magni Laksáfoss søkja í skrivi dagfest 30.10.2019 Vága kommunu um kr. 50.000 í stuðli til útgávu av bók um Bente Chirstine Broberg.

Í umsóknini verður upplýst, at Mentanargrunnurin hevur játtað kr. 20.000 í stuðli til verkætlanina, sum hevur ein samlaðan mettan kostnað á kr. 429.700.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 14. november 2019:**
**Avgerð:**
Viðmælt at stuðla við Kr. 40.000,-, peningurin verður settur av á fíggjarætlanini í 2020.

**Fíggjarnevndin 21. november 2019:**
**Avgerð:**
Viðmælt

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt av veita kr. 40.000 í stuðli. Stuðulin verður útgoldin í 2020.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 109/19 Støðutakan til skriv frá stigtakarum til nýggjárshald

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 14.11.2019 | 65/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.11.2019 | 81/19 |
| 3 Býráðið | 25.11.2019 | 109/19 |

**Málslýsing:**

Egon Fagraberg og Niels Pauli Dahl Hansen hava í skrivi, dagfest 10.11.2019, vent sær til borgarstjóran við uppskoti um felags nýggjárshald.

Borgarstjórin biður býráðið taka støðu til skrivið.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 14. november 2019:**
**Avgerð:**

Mælt verður til at lata hølir og tilfar til suppu.

**Fíggjarnevndin 21. november 2019:**
**Avgerð:**
Viðmæla at taka undir við avgerðini hjá Mentunar- og trivnaðarnevndini

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at kommunan letur hølir og tilfar til suppu.

Formansváttan:_____________

## 110/19 Støðutakan til áheitan frá Krabbameinsfelagnum um samstarv til heilsufremjandi átak fyri krabbameins-sjúklingar í Vágum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
| --- | --- | --- |
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 14.11.2019 | 63/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.11.2019 | 77/19 |
| 3 Býráðið | 25.11.2019 | 110/19 |

**Málslýsing:**

Krabbameinsfelagið heitir í skrivi, dagfest 18.09.2019, á Vága kommunu um at samstarva um heilsufremjandi átak fyri krabbameinssjúklingar í Vágum.

Tey hugsað, at venjingin verður tvær ferðir um vikuna 1½ tíma hvørja ferð, frá september til apríl/ mai, við 1 tíma rørslu og ½ tíma við sosialari samveru og at tað er ein fysiotera-peutur, ið er venjari.

Í telefonsamrøðu sigur Jansy Gaardlykke, at tey ynskja at talan verður um eitt felags tiltak fyri báðar kommunurnar í Vágum. Tey hava fingið játtan frá Sørvágs kommunu um, at tey vilja vera við.

Hon veit ikki, hvat tiltakið kemur at kosta, men tey vóna, at kommunurnar vilja lata hølir og rinda fyri venjara.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 14. november 2019:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 21. november 2019:**
**Avgerð:**
Viðmælt

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at lata hølir og rinda fyri venjara.

Formansváttan:____________

**111/19 Eigarin av matr. nr. 397a í Vatnsoyrum søkir um at áður givnar treytir fyri breidd á Marknaveg í sambandi við sundurbýti og útstykking verða broyttar**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.11.2019 | 112/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 111/19 |

**Málslýsing:**

Býráðið samtykti á fundi tann 28. januar 2019 at viðmæla umsókn frá Karl Johan Nielsen um sundurbýti av matr. nr. 397a í Vatnsoyrum við teirri treyt, at avlagdur verður vegur í 8 metra breidd til grundstykkini sambært almennu byggisamtyktini fyri Vága kommunu §23, stk. 1.

Karl Johan Nielsen heitir í skrivi tann 29. mai 2019 á býráðið um at taka málið upp til nýggja viðgerð og viðmæla, at breiðkanin av Marknavegi verður deild upp í niðaru og ovaru helvt av vegnum. Karl Johan metir, at bert er neyðugt av leggja av til veg í 8 metra breidd til niðastu stykkini, sum eru matr. nr. 287d, 398b, 398c, 398d og 398e.

Viðmerkingar frá umsitingini:
Umsitingin metir, at tá talan eru um ein veg, er talan um eina heild. Umsitingin metir tað ikki sambæriligt við ásetingarnar í byggisamtyktini, at gera ein veg smælari, tess nærri ein kemur endanum av vegnum.

**Tekniska nevnd 18. november 2019:**
**Avgerð:**

Mæla til at halda fast við samtyktina frá 28. januar 2019.

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Býráðið metir at málið er ov illa upplýst og beinir tað aftur í teknisku nevnd til nýggja viðgerð.

Heðin Poulsen luttók ikki í viðgerðini.

Formansváttan:____________

# 112/19 Støðutakan til, um kommunan skal ogna sær lendið á Kumlum, har kommunan hevur lagt kloakk og gjørt gøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.11.2019 | 113/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.11.2019 | 83/19 |
| 3 Býráðið | 25.11.2019 | 112/19 |

**Málslýsing:**

Kommunan hevur latið leggja kloakk av Kumlum og út á Skarvatanga. Í einum øki á Kumlum eigir kommunan ikki lendið, har kloakkin er løgd í. Í sama øki hevur kommunan latið gera gøtu.
Umhvørvisstovan hevur mált lendið, har gøtan liggur upp.Talan er um umleið 460 fermetrar.

Viðmerkingar frá umsitingini: Býráðið eigur at taka støðu til, um kommunan skal fara í samráðingar við eigararnar um at ogna sær lendið.

**Tekniska nevnd 18. november 2019:**
**Avgerð:**

Viðmælt at kommunan ferð í samráðingar við eigararnar um keyp av lendinum.

**Fíggjarnevndin 21. november 2019:**
**Avgerð:**
Viðmælt at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at kommunan skal fara í samráðingar við eigararnar um keyp av lendinum.

Albert Ellefsen luttók ikki í viðgerðini.

Formansváttan:____________

# 113/19 Støðutakan til, um kommunan skal royna at finna eykaskrúvuna á Nýggjaberg og, um hon verður funnin, taka hana upp, so hon kann varðveitast sum krígsminni.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 14.11.2019 | 51/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 113/19 |

**Málslýsing:**

Krígssavnið hevur vent sær til kommununa við fráboðan um, at tey hava frætt, at eykaskrúvan á Nýggjaberg liggur undir betonginum á bryggjuni á pierinum á Heimaru Bryggju.
Tey heita á kommununa um at kanna, um so er, og, um hildið verður at hon er har, at taka hana upp, so hon kann varðveitast sum krígsminni.
Munin hevur, vegna kommununa, skannað økið fyri at kanna, um tey kunna staðfesta, hvar skrúvan liggur.
Tey siga seg ikki kunna siga við vissu, um tey hava funnið skrúvuna, tí sera nógv jarn er í betonginum á bryggjuni. Tó meta tey, grunda á teirra mátingar, at størstu sannlíkindi eru fyri at finna skrúvuna 11,5m frá endanum av bryggjuni og 9,0m frá innaru síðu av bryggjuni.

Viðmerking frá umsitingini:
Nevndin eigur at taka støðu til, um betongið skal brótast upp, har mett verður at skrúvan liggur, fyri at kanna, um hon er at finna.
Um avgjørt verður at bróta bryggjuna upp, eigur hetta at vera gjørt, áðrenn bryggjan verður umvæld.
Eingin kostnaðarmeting er gjørd og eingin peningur avsettur til arbeiðið.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 14. november 2019:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at royna at fáa skrúvuna upp í sambandi við tað umvælingararbeiðið, sum nú verður gjørt við bryggjuna.

Formansváttan:____________

# 114/19 Støðutakan til umsókn um loyvi at leiga "Gamla Telefonhúsið" á matr. nr. 388 í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.11.2019 | 116/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 114/19 |

**Málslýsing:**

Andras Davidsen søkir kommununa um loyvi at leiga «Gamla Telefonhúsið» á matr. nr. 388 at hava seyð í. Andras bjóðar sær at umvæla hurð, vindeygu og tak, møguliga sum part av leigu.

**Tekniska nevnd 18. november 2019:**
**Avgerð:**

Mælt verður frá at at ganga umsóknini á møti.

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

## 115/19 Støðutakan til umksókn frá Miðvágs Róðrarfelag um loyvi at gera nýggja bátabrúgv við Róðrarneystið í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.11.2019 | 117/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 115/19 |

**Málslýsing:**

Miðvágs Róðrarfelag søkir um byggiloyvi til nýggja bátabrúgv við Róðrarneystið á matr. Nr. 233e í Miðvági.
Ætlanin er at stoypa ein garð framvið verðandi drátti, so at tey kunnu fáa tvær brúgvar upp.

Viðmerkingar frá umsitingini: Støða eigur at vera tikin til umsóknina, og, um avgjørt verður at geva loyvi, um neyðugt er at senda umsóknina til viðgerðar hjá friðingarmynduleikunum.

**Tekniska nevnd 18. november 2019:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

Jens Gaardlykke luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at geva loyvi, treytað av at loyvi eisini verður fingið frá friðingarmyndugleikunum.

Formansváttan:____________

# 116/19 Umsókn um byggiloyvi til nýggja staðseting av standmyndini "Seyðamaðurin á Sondum"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.11.2019 | 118/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 116/19 |

**Málslýsing:**

Sigurd Fríði Fróðason søkir vegna Sandavágs Fornminnafelag um nýtt byggiloyvi til standmyndina á Sjóberinum í Sandavági.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Økið ætlanin er at seta standmyndina á er ogn hjá kommununi.

**Tekniska nevnd 18. november 2019:**
**Avgerð:**

Viðmælt
Dagbjørn Hansen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at geva loyvi.

Dagbjørn Hansen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Formansváttan:____________

## 117/19 Umsókn viðvíkjandi virkisbygningi á Hillingartanga, keyp av økið millum matr. 232b og Timburhandilin (partur av vegi ba)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.11.2019 | 121/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.11.2019 | 85/19 |
| 3 Býráðið | 25.11.2019 | 117/19 |

**Málslýsing:**

Oilwind søkir um loyvi at keypa lítla geiran, sum kommunan eigur millum matr. Nr 232b og matr. Nr. 248. Økið er partur av matr. Nr. Ba, sum er avlagt til veg.

**Tekniska nevnd 18. november 2019:**
**Avgerð:**

Mælt verður til ikki at ganga umsóknini á møti.

**Fíggjarnevndin 21. november 2019:**
**Avgerð:**
Viðmæla at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt ikki at ganga umsóknini á møti.

Formansváttan:____________

## 118/19 Umsókn um at umbyggja vestara part av pakkhúsinum Úti á Bakka 1 til íbúð.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.11.2019 | 129/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 118/19 |

**Málslýsing:**

Lona Johansen søkir um loyvi at umbyggja vestara part av pakkhúsinum úti á Støð 1 (mart. nr. 21d), til íbúð.

Viðmerkingar frá umsitingini:

Umsitingin hevur kannað tekningarnar, og lúka tær allar treytir til brunakrøv, bjargingarop og rímingarleið.

Pakkhúsið liggur í øki G: Neyst. Báta- og húsvognapláss,»marina» við felagshúsi.

Byggivaldið kann, í serstøkum førum, geva loyvi til at innrættað bústað.

1. Øki verður lagt av til neyst, felagshús, báta- og húsvogna pláss. Í serstøkum førum verður loyvi givið til at innrætta bústað, treytað av skipaðum el-, vatn- og spillivatnsviðurskiftum.

**Tekniska nevnd 18. november 2019:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at ganga umsókninni á møti.

Dánial Johansen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Formansváttan:____________

## 119/19 Støðutakan til ummæli av umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 375a og 375b í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.11.2019 | 123/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 119/19 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent býráðnum umsókn frá Sundshaga um marknaumskipan millum matr. Nr. 375a og 375b í Sandavági til ummælis.
Økið, talan er um, skal nýtast til grundøki til smoltstøðina hjá Luna á Fútakletti.
Økið er útlagt sum C-øki (vinnuendamál) í byggisamtyktini.

**Tekniska nevnd 18. november 2019:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Viðmælt.

Formansváttan:____________

## 120/19 Støðutakan til uppskot frá HMP um stødd á grundstykkjum í Vatnsoyrum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.11.2019 | 125/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 120/19 |

**Málslýsing:**

Ein serstøk byggisamtykt var í 2008 gjørd fyri eitt øki í Vatnsoyrum. Sambært serstøku byggisamtyktini skulu grundstykkini vera umleið 24,5m long og 23,0m. Breið Tá stykkini vóru býtt sundur, vísti tað seg, at at stykkini vóru so smá, at ikki var pláss at byggja sambært byggisamtyktini.
Býráði samtykti tí á fundi tann 11.06-2019 at víðka grundstykkini, so tey eru í trá við serstøku byggisamtyktina.
Umsitingin hevur biðið HMP gera uppskot um, stødd og plasering av grundstykkjum.

**Tekniska nevnd 18. november 2019:**
**Avgerð:**

Samtykt.

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt.

Formansváttan:____________

## 121/19 Umsókn frá Jóahnnus og Vilhelm Hansen, um altan á matr. nr. 221e í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.11.2019 | 128/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 121/19 |

**Málslýsing:**

Jóhannus og Vilhelm Hansen søkja um loyvi at seta eina lítla altan / balkon á neysti, sum teir byggja á matr. Nr. 221e úti á Bakka í Sandavági.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Altanin / balkongin kemur at hanga út um matr. Nr. 221e, inn yvir matr. Nr. 323a, sum er havnaøkið, sum kommunan eigur. Undirkanturin á altanini / balkongini verður í 9,00 metra hædd, so hetta skuldi ikki verði til nakran ampa fyri virksemi á havnaøkinum.

Kommunan kann loyva umsøkjaranum at seta altanina / balkongina upp, tá kommunan er eigari av matriklinum, sum hon hongur útyvir.

**Tekniska nevnd 18. november 2019:**
**Avgerð:**

Viðmælt.

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at ganga umsóknini á møti.

Formansváttan:____________

# 122/19 Støðutakan til uppskot frá borgarstjóranum til 'Reglugerð fyri viðgerð og avgreiðslu av umsóknum til kommununa um fíggjarligan stuðul frá feløgum og einstaklingum til mentan og ítrótt'

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 14.11.2019 | 64/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.11.2019 | 82/19 |
| 3 Býráðið | 25.11.2019 | 122/19 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin skjýtur upp, at býráðið samtykkir at seta í gildi fylgjandi:

*«Reglugerð fyri viðgerð og avgreiðslu av umsóknum til kommununa um fíggjarligan stuðul frá feløgum og einstaklingum til mentan og ítrótt*

*§ 1. Kommunan letur ikki stuðul til umsøkjarar, sum ikki hava heimstað ella bústað í kommununi.*
*Stk. 2. Undantak kann gerast frá ásetingini í stk. 1, um stuðulin í høvuðsheitum verður brúktur í kommununi til endamál, sum koma borgarunum í kommununi til góða.*

*§ 2. Kommunan letur ikki stuðul til virksemi, sum vinnurekandi standa fyri og sum hevur fíggjarligan vinning fyri eyga.*

*§ 3. Kommunan letur ikki stuðul til næmingaferðir.*

*§ 4. Kommunan kann lata rakstrarstuðul til ítróttar- og mentanarfelagsskapir treyta av:*
- *a) At felagsskapurin hevur skipaða limaskráseting og nøktandi felagslóg*
- *b) At felagsskapurin er opin og almennur*
- *c) At felagsskapurin er virkin*
- *d) At felagsskapurin hevur roknskap*

Formansváttan:____________

*§ 5. Kommunan kann lata stuðul til einstøk mentunar- og ítróttartiltøk treyta av:*

*a) At tiltakið er viðkomandi og mennandi fyri borgararnar í kommununi*

*b) At tiltakið er alment*

*§ 6. Í sambandi við 100 ára føðingardagar hjá borgarum í kommununi rindar kommunan fyri høli, mat og matgerð.*

*§ 7. Umsóknir um stuðul sambært §§ 4-6 skulu latast kommununi skrivliga og skulu á nøktandi hátt lýsa ítøkliga endamálið við stuðlinum.*

*§ 8. Borgarstjórin hevur heimild til at avgreiða umsóknir um stuðul sambært í hesi reglugerð, tá stuðulsupphæddin ikki fer uppum kr. 10.000,00, tó ikki tá talan er um undantak sambært §1, stk. 2.*
*Stk. 2. Mentunar- og trivnaðarnevndin avgreiðir umsóknir um stuðul, tá stuðulsupphæddin er omanfyri kr. 10.000,00 men ikki hægri enn kr. 30.000,00.*
*Stk. 3. Umsóknir um stuðulsupphæddir omanfyri kr. 30.000,00 men ikki hægri enn kr. 50.000 kunnu játtast av fíggjarnevndini treytað av viðmæli frá mentunar- og trivnaðarnevndini.*
*Stk. 4. Umsóknir um stuðulsupphæddir omanfyri kr. 50.000 kunnu játtast av býráðnum.*
*Stk. 5. Avgerðir um at noktað at veita stuðul eftir stk. 1-3 skulu leggjast fyri býráðið til endaliga støðutakan.*

*§ 9. Henda reglugerð kemur í gildi, tá hon er samtykt á býráðsfundi. Samtundis fer úr gildi "Reglugerð fyri stuðul til feløg og tiltøk í Vága kommunu" samtykt á býráðsfundi 26.03.2014.»*

---

'Reglugerð fyri viðgerð og avgreiðslu av umsóknum til kommununa um fíggjarligan stuðul frá feløgum og einstaklingum til mentan og ítrótt' kemur í staðin fyri galdandi 'Reglugerð fyri stuðul til feløg og tiltøk í Vága kommunu' frá 26.03.2014.

Nýggja reglugerðin byggir á undanfarnu reglugerð. Høvuðsbroytingarnar eru:
1. borgarstjórin fær heimild at játtað stuðul,
2. støddin á upphæddunum, sum kunnu játtast av uttan at leggja fyri býráðsfund eru hækkaðar,
3. krav verður sett um skrivliga umsókn,
4. noktaðar umsóknir skulu leggjast fyri býráðsfund til endaliga støðutakan.

Endamálið við uppskotinum er at stytta um viðgerðartíðina fyri umsóknir um stuðul og at lætta um arbeiðsbyrðuna bæði hjá umsitingini og býráðnum.

**<u>Mentunar- og trivnaðarnevndin 14. november 2019:</u>**
**Avgerð:**

Mælt verður til at § 6 verður broytt til: Kommunan rindar fyri hølir, reingerð og kaffiborðhald. Og § 8, stk. 1 verður broytt til: Kr. 2.000,- og § 8, stk. 2 verður broytt til omanfyri Kr. 2.000,- men ikki hægri enn Kr. 30.000,-

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**Fíggjarnevndin 21. november 2019:**
**Avgerð:**
Viðmælt við broytingunum hjá Mentunar- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt við broytingunum hjá mentunar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 123/19 Støðutakan til uppskot frá borgarstjóranum til 'Reglugerð fyri umsiting av tekniska økinum hjá Vága kommunu'

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.11.2019 | 122/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.11.2019 | 86/19 |
| 3 Býráðið | 25.11.2019 | 123/19 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin skjýtur upp, at býráðið samtykkir at seta í gildi fylgjandi:

*«Reglugerð fyri umsiting av tekniska økinum hjá Vága kommunu*

*§ 1. Tekniski leiðarin hevur, við tilvísing til borgarstjóran, ræðisrættin yvir* § 6 Teknisk mál – rakstur *í fíggjarætlanini hjá kommununi.*
*Stk. 2. Heimildin í stk. 1 ávirkar ikki rættin hjá býráðnum til at samtykkja broytingar í galdandi fíggjarætlan, ella at binda ávísar upphæddir í fíggjarætlanini til ávís endamál.*

*§ 2. Tekniski leiðarin hevur ábyrgd fyri, at bygningar, vegir, lendi og veitingar hjá kommununi eru í so góðum standi, sum fíggjarligu karmarnir loyva.*
*Stk. 2. Tekniska leiðarin hevur ábyrgd fyri at raðfesta viðlíkahald á slíkan hátt, at flest møguligir borgarar fáa størst møguligt gagn av tí arbeiði, sum gjørt verður.*
*Stk. 3. Atlit skal takast til einstakar borgarar í teimum førum, at ábøtur á ognir hjá kommununi, eru avgerandi fyri trivnað og/ella ogn hjá viðkomandi borgarum.*

*§ 3. Tekniski leiðarin hevur ábyrgdina fyri, at íløgur, sum býráðið hevur samtykt at gera, vera framdar so skynsamt og effektivt sum til ber og í samsvarið við allar viðkomandi lógir og reglur.*

*§ 4. Tekniski leiðarin avgreiðir allar umsóknir um byggiloyvi o.l. uttan so, at talan er um at gera frávik í mun galdandi byggisamtykt ella aðra reglugerð.*
*Stk. 2. Er talan um at gera frávik, sum eru heimilað í byggisamtykt, tekur tekniska nevnd avgerð.*
*Stk. 3. Er talan um at gera frávik frá byggisamtykt ella aðrari reglugerð, uttan positiva heimild, skal málið leggjast fyri býráðið.*
*Stk. 4. Umsóknir, sum tekniski leiðarin, eftir fullfíggjaða viðgerð, ikki metir kunnu gangast á møti, skulu leggjast fyri býráðið til endaliga støðutakan.*

*§ 5. Tekniski leiðarin skipar tekniska øki við atliti til starvsfólkatrivnað, skynsemi og effektivitet, í tann mun, býráðið ikki hevur gjørt ítøkiligar ásetingar um bygnað.*

*§ 6. Henda reglugerðin kemur í gildi tá hon er samtykt av býráðnum.»*

Formansváttan:____________

Endamálið við uppskotinum er at effektivisera viðlíkahaldi av kommunalum ognum, stytta um viðgerðartíðina fyri umsóknir um byggiloyvi og o.tl. og at lætta um arbeiðsbyrðuna bæði hjá umsitingini og býráðnum.

**<u>Tekniska nevnd 18. november 2019:</u>**
**Avgerð:**

Viðmælt við hesi viðmerking til § 4 stk.1: TN skal verða kunnað um øll byggiloyvi, sum umsitingin skrivar út.

**<u>Fíggjarnevndin 21. november 2019:</u>**
**Avgerð:**
Mælt verður til, at § 4 verður orðað soleiðis:

**"§ 4**. Tekniski leiðarin avgreiðir allar umsóknir um byggiloyvi o.l. uttan so, at talan er um at gera frávik í mun galdandi byggisamtykt ella aðra reglugerð.
*Stk. 2.* Áðrenn loyvi verður útskrivað sambært stk. 1, skulu limirnir í teknisku nevnd hava málið til hoyringar í 5 yrkadagar, har teir hava møguleika til at krevja, at málið fær politiska viðgerð. Hevur umsitingin einki hoyrt, tá hoyringsfreistin er farin, útskrivar tekniski leiðarin viðkomandi loyvi.
*Stk. 3.* Er talan um at gera frávik, sum eru heimilað í byggisamtykt, tekur tekniska nevnd avgerð.
*Stk. 4.* Er talan um at gera frávik frá byggisamtykt ella aðrari reglugerð, uttan positiva heimild, skal málið leggjast fyri býráðið.
*Stk. 5.* Umsóknir, sum tekniski leiðarin, eftir fullfíggjaða viðgerð, ikki metir kunnu gangast á møti, skulu leggjast fyri teknisku nevnd til endaliga støðutakan."

**<u>Býráðið 25. november 2019:</u>**
**Avgerð:**
Samtykt við broytingunum hjá fíggjarnevndini.

## 124/19 Støðutakan til umsókn frá Felagnum Vágar um eykajáttan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.11.2019 | 88/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 124/19 |

**Málslýsing:**
Felagið Vágar hevur eitt krav uppá kr. 73.000,- fyri leasing av kopimaskinu frá Formula/XEROX. Felagið Vágar hevur ikki pening tøkan at gjalda við og heitir á kommunurnar um eykajáttan. Parturin hjá VK. er uml. kr. 50.000,-

**Fíggjarnevndin 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at veita eykajáttan, og at avseta peningin á eykaætlan 5.

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at veita eykajáttan, og at avseta peningin á eykaætlan 5/2019.

Formansváttan:_____________

VÁGA KOMMUNA

# 125/19 Støðutakan til umsókn, frá Felagið Vágar, um stuðul fyri árið 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.11.2019 | 89/19 |
| 2 Býráðið | 25.11.2019 | 125/19 |

**Málslýsing:**
Søkt verður um stuðul fyri árið 2020 uppá kr. 1.350.000,- Tá er Mentunarvikan og lønarútreiðslan í 6mdr. til ein menningarpersón íroknað. Parturin hjá Vága kommunu er umleið kr. 820.000,-

**Fíggjarnevndin 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Á fíggjarætlanini fyri 2020 eru avsettar kr. 1.275.000,- til Felagið Vágar. Mælt verður til at halda játtanina.

**Býráðið 25. november 2019:**
**Avgerð:**
Samtykt at Vága kommuna játtar stuðul svarandi til lutfalsliga partin av kr. 1.275.000, sum er umleið kr. 774.000.

Formansváttan:____________

Fundurin lokin kl. 21:03

Eyðdis Hartmann Niclasen

Dagbjørn Hansen

Albert Ellefsen

Heðin Poulsen

Jonhard Joensen

Jórun S. Haraldsen

Dánial Johansen

Jóhannis Joensen

Tórdis Dam Johannesen

Formansváttan:____________